VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Hann veksur vindin upp í skrið ella storm av útsynningi. Seinapartin hækkar hann upp í útnyrðing og minkar vindin niður í ein strúk. Ælingur, sum frálíður kavi og hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið hósdagin:
Hann minkar vindin niður í lot av norði og okkurt kavaælið, seinnapartin fleyr av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 0 og +3 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fyrrapartin fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í strúk av landsynningi og um kvøldið avfall – partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur. Hitin um 4 stig. Sunnudagin veksur hann vindin av útnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið um frostmarkið.

Snakkað upp á nakkan á øðrum

Ein maður varð í Føroya Rætti í dag ákærdur fyri at hava upprættað eitt telefonhald í annan mans navni. Hann hevði tosað fyri smáar 11.000 krónur uttan viðkomandi visti av

Bo Christian Vestergaard Larsen fekk eina óvæntaða telefonrokning, sum hann tó noktaði at gjalda. Eftir rættarfundin í Sæby hevur Kall slept kravinum móti Bo Larsen

Mynd: Jens Kristian Vang

DOKUMENTFALSAN
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Tað var ikki sørt av einum hvøkki, Bo Christian Vestergaard Larsen fekk í mai 2006, tá hann varð stevndur at møta í rættinum í Sæby við kravi um at rinda eina telefonrokning frá Kall.

Bo Larsen hevði í hálvt triðja ár búð og arbeitt í Føroyum. Bústaðin hevði hann saman við systir síni og sjeiki hennara, men tá tað bleiv liðugt millum hesi bæði, flutti systurin niður til Danmarkar aftur. Hon var tá við barn á øðrum sinni, og Bo Larsen fór tí niður til Danmarkar 31. januar 2005 at hjálpa systrini til hon hevði átt.

Dagin eftir – 1. februar 2005 – varð eitt telefonhald upprættað í navninum hjá Bo Larsen, fullfíggjað við P-tali og tí, sum hartil hoyrdi.

Bo Larsen veit so av ongum, til hann knappliga verður boðsendur av rættinum í Sæby við kravi frá Kall um at gjalda telefonrokningina áljóðandi krónur 10.969,75.

- Eg visti beinanvegin, hvør stóð aftan fyri hetta, og tað fyrsta eg gjørdi eftir rættarfundin, var at ringja upp til Føroyar og melda fyrrverandi svágin fyri dokumentfalsan, sigur Bo Larsen.

Uttan at kenna nakað til hesa ólógligu upprættan av telefonhaldi, kom Bo Larsen aftur til Føroya um hálvan mars 2005, tí hann um tað mundið hevði føroyska unnustu. Hann var so í Føroyum fram til hálvan mai, tá hann aftur fór til Danmarkar við Lómi. Umborð til Danmarkar var eisini fyrrverandi svágurin, og tá segði hann við Bo Larsen, at hann hevði gjørt eitthvørt, sum hann ikki átti at havt gjørt, og tá Bo fann út av hesum, fór hann helst ikki at vilja tosa við seg aftur. Men hann kom ikki nærri inn á, júst hvat tað var, hann hevði gjørt.

Seinni fann Bo Larsen so fram til, hvat fyrrverandi svágurin hevði sipað til.

Tað vísti seg, at svágurin hevði roynt at eftirlíknað hondskriftina hjá Bo Larsen, uttan at hetta tó hevði eydnast serliga væl. Í rættinum í dag gav Bo Larsen dømi um egna hondskrift, so bæði dómari, ákæri og verji kundu sammeta við útfylta skjalið frá Kall.

Ákærdi sjálvur, sum hevur búð drúgva tíð í Danmark, møtti ikki í Føroya Rætti í dag, tí hann skuldi til jarðarferð í heimbygd síni.

Verður viðkomandi dømdur, skal hann eisini rinda sakarmálskostnaðin. Hetta umfatar tó ikki ferða- og uppihalds útreiðslurnar hjá vitninum, sum var komið úr Danmark til tað sama. Vitnisútreiðslur rindar danski staturin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-18
Nuuk	-6
Qaqortoq	0
Ammassalik	-12
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	5
Lerwick	6
Aberdeen	8
London	11
Tromsø	--
Bergen	6
Oslo	--
Stokkhólm	0
Keypmannah.	5
Helsinki	-4
Moskva	-10
Berlin	2
Warzawa	-3
Kiev	-7
Bukarest	0
Paris	7
Madrid	12
Róm	12
Malorca	15
Athen	7
Malta	13
Tunis	13
Beijing	1
New Dehli	28
Bangkok	32
Jakarta	31
Sydney	--
New York	5
Miami	23
Los Angeles	15
Meksikobýur	--
Panama	32
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. í útsynning úr Íslandi fer móti Íslandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í kvøld – týskvøld.



Í dag:
Lágtrýstið yviri á Suðurlandinum fer eystureftir og gevur nógvan vind á okkara leiðum mikudagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 22/02 kl. 06⁰⁰ – 23/02 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,4°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 8,0 mm – mált frá 22/02 kl. 06⁰⁰ – 23/02 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 128 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

16. februar Seinna kvarter
19. februar Mánin longst frá jørðini
25. februar Tendring
7. mars Mánin næstur jørðini

Keldu: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
24. feb.	6:11	18:30	5:11	17:30	5:26	17:45	8:11	20:30	9:11	21:30	4:26	16:45	3:26	15:45	6:26	18:45	7:26	19:45	5:56	18:15	7:11	19:30
25. feb.	6:49	19:08	5:49	18:08	6:04	18:23	8:49	21:08	9:49	22:08	5:04	17:23	4:04	16:23	7:04	19:23	8:04	20:23	6:34	18:53	7:49	20:08
26. feb.	7:27	19:46	6:27	18:46	6:42	19:01	9:27	21:46	10:27	22:46	5:42	18:01	4:42	17:01	7:42	20:01	8:42	21:01	7:12	19:31	8:27	20:46
27. feb.	8:05	20:25	7:05	19:25	7:20	19:40	10:05	22:25	11:05	23:25	6:20	18:40	5:20	17:40	8:20	20:40	9:20	21:40	7:50	20:10	9:05	21:25
28. feb.	8:45	21:06	7:45	20:06	8:00	20:21	10:45	23:06	11:45	-	7:00	19:21	6:00	18:21	9:00	21:21	10:00	22:21	8:30	20:51	9:45	22:06